# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Heini hyggur frameftir


Heini Hanusarson arbeiddi væl undir landsliðsvenjingini á Hálsi í gjárkvøldið: – Tað, sum er farið, er farið, sigur hann

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**– Vit eru samdir um, at tað, sum er farið, er farið. Nú vóni eg bara, at vit allir arbeiða saman og gera alt fyri Føroyar fyri at fáa eitt gott úrslit, sigur Heini Hanusarson, sum aftur er at síggja á manslandsliðnum í hondbólti. Dia Midjord, annar av venjarunum, fegnast um at hava Heina aftur á liðnum.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Ymsar hendingar eftir dystin í Sarajevo ímóti Bosnia tann 1. november í fjør høvdu við sær, at Hondbóltssambandið gav Heina Hanusarson karantenu í tveir dystir, og seinni var karantenan so víðkað til at fevna um restina av hesum árinum. Men herfyri var talvan vaskað rein og allar karantenur, ið ætlandi eisini skuldu raka aðrar spælarar, sum vóru við í Sarajevo, eru nú strikaðar.

Hetta merkir ikki minst, at kanska týdningarmesti spælarin á føroyska manshondbóltslandsliðnum aftur er tøkur, og í gjárkvøldið taldist hann millum hugagóðu landsliðsmenninar, ið vandu upp á lívið í ítróttarhøllini á Hálsi.

– Eg eri klárur til dystin ímóti Sveis og nú vóni eg bara, at vit allir arbeiða saman og gera alt fyri Føroyar fyri at fáa eitt gott úrslit. Eg havi tosað við venjararnar, og vit eru væl aftur. Tað, sum er farið, er farið, sigur Heini Hanusarson, tá vit fáa orðið á hann eftir venjingina.

### Styrkir um liðið

At Heini aftur er við á landsliðnum, fegnast eisini annar av landsliðsvenjarunum, Dia Midjord, um.

– Tað er fínt, at vit hava fingið Heina aftur, eftir at hann nú hevur verið burturi frá tveimum av EM-dystunum. At vit hava hann á liðnum, gevur okkum eina størri hóttan á høgra bakki, og samstundis fáa vit sett spæli eitt sindur øðrvísi upp hjá okkum, sigur Dia.

– Heini dregur nokk so nógv til sín yviri í høgru síðu, og tí fáa vit gjørt fleiri kombinatiónir í vinstru síðu. So tað er eingin ivi um, at hann styrkir væl um liðið, nú hann aftur er við.

Sjálvur sigur Heini, at konditiónin kanska hevur verið betri, enn hon er júst nú, men at hon so avgjørt er brúkilig, sum hann tekur til.

– Formurin er rímiligur, og eg havi ið hvussu er fingið nógva og góða mótstøðu í Danmark. Eg havi havt eitt sindur av trupulleikum við øklinum, men tað hevur lagt seg aftur, so eg eri púra klárur at møta Sveis, sigur kollfirðingurin, sum í løtuni er einasti føroyingur, sum spælir á hægsta stigi uttan fyri landoddarnar.

# Spælskiparararnir skaddir

**Bæði Tróndur Kragesteen og Janus Sørensen, sum hava verið brúktir sum spælskiparar í síðstu hondbóltslandsdystunum hjá Føroyum, eru blivnir skaddir beint undan Sveisdystunum, so tí noyðast venjararnir at gera smærri rokeringar á liðnum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*


*Kári Nielsen og Dia Midjord skulu blanda kortini eitt sindur øðrvísi undan Sveis-dystinum, nú báðir spælskipararnir eru úti við skaða*

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Hóast væl hevur gingist undir venjingunum hjá manslandsliðnum í hondbólti undan dystinum í EM-undankappingini, sum í annaðkvøld verður spældur í ítróttarhøllini á Hálsi, eru venjararnir eitt sindur í døpurhuga, nú dysturin nærkast. Orsøkin er, at tveir av týdningarmiklu spælarunum ikki fáa spælt.

– Vit hava fingið eitt lítið sindur av trupulleikum, tí báðir spælskiparararnir, Tróndur Kragesteen og Janus Sørensen, hava fingið skaðar teir seinastu dagarnar. Tróndur hevur trupulleikar við økslini og skotarminum hjá sær, og Janus hevur meira trupulleikar við lyskuni og niðri í beininum, sigur Dia Midjord, sum saman við Kára Nielsen venur manslandsliðið.

– Teir báðar skulu vit ikki vænta at síggja í dystinum ímóti Sveis í annaðkvøld, so vit koma at gera onkrar sovorðnar smávegis rokeringar á liðnum. Men eg skal viðganga, at tað ger tað serliga trupult, at tað júst eru teir báðir spælskiparararnir, ið nú sita uttanfyri.

### Aðrar møguleikar

Dia Midjord vísir á, at sjálvandi eru aðrir møguleikar, tí fleiri á liðnum hava verið spælskiparar, men at júst tað plássið er eitt, ið krevur eitt sindur meira.

– Sum spælskipari fert tú ikki bara inn at spæla eftir einum degi, tí tað skalt tú helst venja teg eitt sindur við. Avtalurnar skulu fáast upp á pláss, og spælskiparararnir skulu jú koyra avtalurnar, sigur hann.

– Men vit hava nógvar møguleikar, tí nógvir duga at spæla har. Eitt nú hava vit Inga Olsen, Finn Hansson og eisini aðrar møguleikar, so vit mugu fáa loyst hetta upp á frægast máta. Men tað er altíð keðiligt at missa teir báðar, sum vit hava brúkt á hesum plássinum í síðstu dystunum.

Dia vísir á, at sum heild eru spælararnir væl fyri, nú landskappingin gongur ímóti endanum. Hann sigur, at teir báðir, sum eru farnir burturúr, eru eitt sindur slitnir og onkrir aðrir eisini, men at hinir eru øgiliga væl fyri.

Dysturin ímóti Sveis, sum er fimti dysturin hjá Føroyum í hesi EM-undankappingini, verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn í annaðkvøld klokkan 19.